# Álit
# um yrkisútbúgving innan landbúnað



Tilevnað av arbeiðsbólki, tilnevndur av Yrkisútbúgvingarráðnum í februar 2001

Handað ráðnum í september 2001.

# INNIHALD

**Útgangsstøðið** ………………………………………………… 2

**1. Arbeiðssetningur** ………………………………………………… 2
1.2. Arbeiðið hjá bólkinum ………………………………………… 3

**2. Samandráttur av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum** …………………… 3

**3. Krøv innan landbúnaðin í dag** ………………………………… 3
3.1. Endamál fyri útbúgvingini ……………………………………… 4

**4. Meting av gørðum, sum kunnu lúka treytirnar sum lærupláss** ……… 5
4.1. Hvørji brúk lúka høvuðstreytirnar ……………………………… 6
4.2. Hvørjar treytir eiga annars at verða settar brúkum, sum kunnu taka lærlingar? ……………………………………………………… 6
4.3. Tal av lærlingum ……………………………………………… 7

**5. Skipan av útbúgvingini** ………………………………………… 7
5.1. Býtið millum verkliga læru og skúlagongd ……………………… 7

**6. Ymisk viðurskifti í sambandi við skúlagongdina** …………………… 9
6.1. Broytingar í verandi lógum og kunngerðum ……………………… 9
6.2. Skúlagongd í Føroyum ella uttanlands ………………………… 9
6.3. Kostnaður …………………………………………………… 9

**7. Uppskúlingarskeið** ……………………………………………… 11

**8. Niðurstøða arbeiðsbólksins** …………………………………… 13

**Fylgiskjal** ……………………………………………………… 14

## Útgangsstøðið

Føroya Bóndafelag heitti í brævi dagfest 23. januar 2001 á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta á stovn eina lærlingaútbúgving við heimild í føroyskari lóggávu. Ynskið hjá felagnum var, at bøndur í framtíðini skulu hava møguleika fyri at hava lærlingar í læru eftir somu skipan, sum t.d. innan handverks- og skrivstovuøkið.

Yrkisútbúgvingarráðið tók áheitanina til eftirtektar og setti ein arbeiðsbólk at gera uppskot um yrkisútbúgving innan landbúnaðin.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:

| | |
|---|---|
| Peder Th. Haahr, | Búnaðardepilin, |
| Regin Borðoy, | Føroya Bóndafelag, |
| Hans A. Dam Joensen, | Mentamálastýrið, og |
| Petur Oluf Hansen, | Ráðsfyrisitingin. |

## 1. Arbeiðssetningur

1) At gera ein yvirskipaðan málsetning fyri útbúgvingina, her í millum
   - fyri tey fakligu málini,
   - fyri tey almennu málini,
   - fyri tey persónligu málini og
   - møguleikar fyri framhaldandi útbúgving.

2) At gera eina meting av brúkum, sum kunnu lúka treytirnar fyri málunum undir punkt 1), her í millum
   - hvørjar treytir skulu setast brúkunum,
   - hvat slag av brúkum talan er um,
   - tal av brúkum, sum mett verður at lúka treytirnar, og
   - hvussu nógv læripláss talan kann verða um.

3) At gera eina meting um, hvussu útbúgvingin skal skipast, her í millum býtið millum verkliga læru og skúlagongd.

4) At gera eina meting um, hvussu skúlagongdin kann skipast, her í millum
   - um verandi lógir og kunngerðir á yrkisútbúgvingarøkinum mugu broytast, um til skal bera at taka skúlagongdina í her heima,
   - um møguleikar eru fyri skúlagongd uttanlands, um so er, at skúlagongdin ikki verður tikin í her heima,
   - um útbúgvingin sum heild kann verða góðkend í øðrum londum, og
   - um fíggjarligar avleiðingar standast av at seta útbúgvingina á stovn.

## 1.2 Arbeiðið hjá bólkinum

Arbeiðsbólkurin hevur havt 8 fundir. Fyrsti fundur var hildin 26. apríl 2001. Arbeiðið hevur gingið væl og limirnir í bólkinum eru samdir um tey tilmæli, sum koma fram í hesum áliti til Yrkisútbúgvingarráðið.

Fyri m.a. at kanna tørvin á lærlingum hevur arbeiðsbólkurin havt fund við Føroya Jarðarráð. Annars hevur arbeiðsbólkurin gjørt brúk av teimum førleikum, sum Fiskivinnuskúlin, Ráðsfyrisitingin og Mentamálastýrið hava á økinum, umframt at vinnuumboðini hava ráðført seg við nevndina í Bóndafelagnum fyri at tryggja sær, at tilmælið hjá arbeiðsbólkinum í størst møguligan mun hevur undirtøku í vinnuni.

# 2. Samandráttur av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin mælir til, at:

1. útbúgving innan landbúnað verður sett á stovn í Føroyum sum ein 3-ára yrkisútbúgving,
2. skúlagongdin í útbúgvingini fer í mestan mun fram á Fiskivinnuskúlanum, sum frammanundan hevur útbúgvingar, sum ein lærlingaútbúgving innan landbúnaðin partvíst kann samskipast við. Harumframt eigur ein partur av skúlagongdini at fara fram á Búnaðardeplinum við atliti yrkislæru-greinunum,
3. fyrsta árið í útbúgvingini er eitt støðisár. Annað árið er upplæring á læru-plássinum. Triðja árið er partvís upplæring á læruplássinum og partvís skúlagongd í 12 vikur, har yrkisroyndin fer fram. Hesar 12 vikurnar kunnu býtast í 2 styttri skúlaskeið,
4. viðkomandi yrkisnevnd samtykkir innihaldið í yrkislærugreinunum og fakligu grundlærugreinunum, og hvørjar hesar skulu vera. Skúlin ger í samráð við yrkisnevndina av, hvørjar tær almennu grundlærugreinirnar á C-stigi skulu vera,
5. útbúgvingin verður skipað soleiðis, at lærlingarnir eisini fáa lestrarførleika til víðari/framhaldandi útbúgvingar,
6. neyðug krøv verða sett læruplássunum, soleiðis at lærlingum verður tryggjað eina læru, sum gevur góðar førleikar til at kunna taka ábyrgd av einum garði,
7. seta arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnu, skúla og avvarðandi myndugleikum at útgreina innihaldið í útbúgvingunum nærri, t.v.s. at tilevna eina útbúgvingarkunngerð, og at
8. skipanin verður sett í verk frá 1. januar 2002.

# 3. Krøv innan landbúnaðin í dag

Landbúnaðurin í Føroyum er nógv broyttur tey seinastu 20 árini og stórar broytingar standa fyri framman. Fyri nøkrum árum síðani varð ikki nógv keypt av t.d. kraftfóðri og handilstøðum – framleiðslan hvíldi í sær sjálvun. Í dag verður nógv fóður og tøð keypt, og við hesum er neyðugt at bóndin alla tíðina má hugsa um úrtøkuna og fáa sum mest burturúr við eitt nú serligum fóður- og taðingar-ætlanum.

Stór krøv verða sett teimum, sum reka garðar í dag. Við nýggju avtaluni víð ES gerast hesi krøv uppaftur størri. Nógvar nýggjar reglugerðir eru á veg, sum skulu skipa vinnuna, bæði á ein og annan hátt.

Verandi festiskipan setur somuleiðis útbúgvingarkrøv til tilstundandi festaran. Møguligt er ikki – sum er – at nøkta hesi krøv í Føroyum. Í álitinum um landbúnaðarpolitikk frá 30. mei 2001 verður stórur dentur lagdur á útbúgving, skeiðvirksemi og eftirútbúgving, til tess at nútíðar føroyska landbúnaðin kann gagnnýta tey tilfeingi, ið finnast, á skilabesta hátt.

## 3.1. Endamálið fyri útbúgvingini

Í yrkisútbúgvingarlógini er ásett, at ein yrkisútbúgving setur mál fyri einstaka lærlingin og samstundis nøktar tey førleikakrøv, ið vinnan setur. Við hesum í huga eiga tey fakligu málini í útbúgvingini at vera, at lærlingurin eftir lokna útbúgving er førur fyri at reka ein garð á fullgóðan hátt við atliti at fylgjandi viðurskiftum:

**3.1.1. Bøur og hagi.** Hvussu fæst sum mest av grøði av hvørjum hektari í mun til útreiðslurnar? Hvat kann veltast á ymsu plássunum? Hvussu er gróðrarbotnurin (mógvur, eyrur, vanlig mold)? Hvussu ávirka tung amboð lendið? Hvussu verður hagin best røktur – er gott at hava nógvan áseyð, ella skal áseyðatalið lækkast og áherðsla heldur leggjast á tvílembur? Hvussu ávirka eitt nú ross og onnur størri djór hagan?

**3.1.2. Kríatúr.** Hvat krevur eitt kríatúr av fóðri, og hvussu eigur samansetingin av proteini, feitti og kolvætu at vera? Hesi evni verða aftur býtt sundur í eitt nú mettað feitt, loftfimar feittsýrur v.m., ið hava ávirkan á framleiðsluna. Hvussu er møguligt at broyta feitt/proteinsamansetningina í mjólkini? Nevnast kunnu onnur viðurskifti, so sum vitaminir, mineralir, vatn, hiti, luftútskifti, luftvæta, inrætting av fjósi/seyðhúsi, ljós, og mangt annað. Eisini er aling av stórum týdningi fyri framleiðsluna í longdini og er tí neyðugt at duga at hava tann rætta tarvin ella brundin. Hetta og mangt annað hevur ávirkan á framleiðsluna. Neyðugt er tí, at bøndur hava kunnleika til tílík viðurskifti.

Framgongdin innan mjólkarframleiðsluna hevur verið uml. 250 litrar pr. kúgv um árið, og kemur hetta í stóran mun av neytaeftirlitinum og stráfóðurgreiningum, sum *Almennar Royndir* hava gjørt. Ein útbúgving innan landbúnaðin hevði havt við sær ein bónda við størri førleikum sum “viðspælara” hjá Almennum Royndum, sum saman við vinnuni hevði kunna rokkið longur fram á mál enn nú.

**3.1.3. Umhvørvi.** Sagt verður vanliga, at festari skal lata jørðina frá sær í minst líka góðun standi til eftirkomararnar, sum hon var í, tá ið hon var latin festaranum. Hava pesticidir (sproytueitur) langtíðarárin og hvussu kan væntast, at hesi evni ávirka gróðurin í komandi tíðum? Hvussu nógv av handilstøðum er ráðiligt at spreiða út og hvat hendir við einum møguligum yvirskoti av køvievnum, fosfor, kalium, svávul og magnesium? Hvussu ávirkar súrhoyggjasevja áir og vøtn?

**3.1.4. Tøkni.** Hvør tøkni er neyðug at hava, og hvørji hjálpartól finnast? Er hjálpin, sum fæst við hesum tólum nóg stór í mun til kostnaðin? Tað finst so nógv tøkni á landbúnaðarøkinum í dag, at fjós kunnu at kalla vera ómannað, við tað at

mestsum alt er sjálvvirkandi við eitt nú mjólkimaskinum, fóðurskipanum, virksemismátarum og mongum øðrum.

**3.1.5. Búskapur.** Soleiðis sum landbúnaðurin er skipaður í dag, er tað er av stórum týdningi, at bóndin hevur kunnleika til grundleggjandi fíggjarligar fortreytir. Teir spurningar, ið eru nevndir omanfyri, eins og mangir aðrir, hava avgerandi ávirkan á rakstrarúrslitið. Tað er umráðandi, at bóndin kennir tær fíggjarligu avleiðingarnar av at broyta t.d. fóðurgevingina. Afturat hesum má ein bóndi vera førur fyri at gera kostnaðarætlanir, bæði tá ið talan er um gjaldføris- og rakstrarætlanir, her í millum at gera metingar um úrtøkuna av mjólka- ella kjøtframleiðsluni, hvørjar íløgur eru skilabestar at gera. Eisini eiga bøndur at duga at gera avleiðingarmetingar, tá ið broytingar henda.

Eingin kennir garðin og grundarlagið fyri útrokningunum betur enn bóndin sjálvur og er tað tí best, um hann er førur fyri at gera hettar arbeiði sjálvstøðugt. Tílíkt setir stór krøv til eina útbúgving innan landbúnaðin, ið sostatt má fevna allar hesar nevndu tættirnar.

**3.1.6. Persónsmenning.** Neyðugt er at menna tilvitskuna um egin evni og møguleikarar at fremja tað í verki, sum innihaldið í landbúnaðarútbúgvingini leggur upp til. Umframt at fáa eina holla verkliga og ástøðiliga vitan um galdandi viðurskifti, mugu luttakararnir eisini kunnast um tað nýggja, sum støðugt kemur fram.

Tað má somuleiðis metast sum umráðandi, at útbúgvingin verður skipað soleiðis, at tann, ið tekur grundútbúgvingina í Føroyum hevur møguleika at nema framhaldandi útbúgving, bæði í Føroyum eins væl og uttanlands.

Samanlagt kann sigast, at tann útbúni lærlingurin má kunna taka fullu ábyrgdina av einum garði og reka hann á við framtíðar møguleikunum fyri eyga. Tá hugsað verður um, hvussu nógv ein bóndi skal hava skil á, má tað metast at vera sjálvsagt, at ein útbúgving fæst innan hetta øki í Føroyum. Tá ið útbúgvingin verður fyrireikað, má neyðugt fyrilit havast fyri, at landbúnaðurin á mangan hátt skilir seg frá øðrum vinnugreinum, serliga tá ið hugsað verður um ábyrgdina og fjøltáttaða virksemið hjá tí einstaka bóndanum. Tað má tó verða mett at vera rættast, at møguleiki er fyri hesum skjótast til ber. Er landbúnaðarútbúgvingin í Føroyum, ber til at ávirka hana soleiðis sum skilabest er, eftir føroyskum umstøðum.

## 4. Meting av gørðum, sum kunnu lúka treytirnar sum lærupláss

Føroysku garðarnir eru sera ymiskir í støðd og umsetningi. Flestallir hava tó seyðahald, nógvir hava neytahald, og summir eitt sindur av grønmeti. Allir hava tó stráfóðurframleiðslu til egið brúk og onkur til sølu.

Mett verður, at teir garðar, sum kunnu taka lærlingar, eru teir størru garðarnir og í mestan mun mjólkaframleiðarar. Hetta m.a. tí, at teir hava ein so mikið stóran umsetning, at møguleiki er fyri at rinda løn sambært tí, sum annars er ásett

frammanundan[1]. Jú størri garðurin er, meira fjøltáttað er virksemið vanliga, soleiðis at lærlingurin kann fáa upplæring innan ymisk virkisøki. Onkur bóndi hevur longu nú lærlingar, sum fáa sína skúlagongd uttanlands.

## 4.1 Hvørji brúk lúka høvuðstreytirnar?

Tey føroysku jarðarbrúkini eru sera ymisk bæði í stødd, umsetningi og á virkisøkjum. Arbeiðsbólkurin metir, at hóskandi er at býta brúkini sundur í tríggjar bólkar við hesum eyðkennum:

- Stór brúk, sum verða rikin á einum nøktandi vinnuligum grundarlagi, fyri at kunna renta skuldina og geva eigaranum eina rímuliga inntøku, og samstundis kunna gjalda møguligari løntari arbeiðsmegi. Hesi brúk eru tey best egnaðu at taka lærlingar.
- Miðalstór brúk, við 100-200, áseyðum og oftast uttan mjólkaframleiðslu ella við heilt fáum kúm. Brúkarin hevur sum meginreglu høvuðsinntøku frá aðrari vinnu, og hevur ikki jarðarbrúk sum fulltíðar vinnu. Hesi brúk eru vanliga ikki egnaði at taka lærlingar.
- Smá ítrivsmerkt brúk, við færri enn 100 áseyðum, har jarðarbrúkið hevur avmarkaðan týdning sum inntøkukelda, men heldur er eitt – meira ella minni krevjandi – frítíðarítriv. Hesi brúk eru ikki egnaði at taka lærlingar.

## 4.2 Hvørjar treytir eiga annars at vera settar brúkum, sum kunnu taka lærlingar?

Treytirnar, ið verða setta til lærupláss innan landbúnaðin, eiga at líkjast teimum treytum, ið settar verða fyritøkum innan t.d. handverks-, handils- og skrivstovuøkið. Hetta eigur at vera gjørt fyri at tryggja lærlinginum eina breiða verkliga vitan um landbúnað sum heild.

Arbeiðsbólkurin kom á fundi við Føroya Jarðarráð til ta niðurstøðu, at uml. 40 av teimum 80 størstu brúkunum í landinum kunnu sigast at lúka treytirnar til stødd og fjølbroytni. Av hesum 40 kann roknast við, *at í hvussu so er 15 hava førleika og evni til at taka lærlingar*. Ein einsæris góðkenning má tó fara fram av einstaka brúkunum eftir galdandi reglum um góðkenning av læruplássi. Harafturat eiga hesar treytir at verða havdar í huga:

1. Garðarnir mugu sum minsta mark hava tvey vinnuøki, t.d. seyðahald og mjólkaframleiðslu og vera fulltíðarbrúk, har bóndin arbeiðir á garðinum fulla tíð.
2. Læruplássið má veraført fyri at læra og vegleiða lærlingin, og hava fólk við førleika og útbúgving, sum er á minst sama støði, sum tann útbúgving, ið lærlingurin fer undir. Helst skal bóndin hava havt garðin í ávísa tíð, og harvið í verki hava víst sínar dygdir sum bóndi.

[1] Sambært § 33 í yrkisútbúgvingarlógini skal lønin í minsta lagi verða tann, ið ásett er í sáttmála millum viðkomandi yrkisfeløg. Í teimum yrkisgreinum, har eingin sáttmáli er galdandi, verður minstalønin ásett av yrkisútbúgvingarráðnum.

3. Lærlingurin eigur, sum meginreglu, at vera á garðinum allar árstíðir, av tí at arbeiðið innan landbúnaðin er sera árstíðarbundið (summar, vár, vetur og heyst).
4. Ein heildarætlan eigur at vera gjørd fyri lærutíðina, soleiðis at lærlinginum verður tryggjað eina fjølbroytta læru. Er virkisøkið hjá viðkomandi avmarkað, má annað brúk finnast afturat, har lærlingurin kann fáa upplæring ein part av tíðini.
5. Brúkið skal tryggja lærlinginum eina læru, sum gevur góðan førleika at kunna taka ábyrgd av eini rakstrargrein. Hetta kann t.d. vera sjálvstøðugt at ansa mjólkineytum ella seyðinum. Innlit eigur eisini at vera givið í rakstrarætlanina og úrtøkuna av teimum ymisku rakstrargreinunum.

### 4.3. Tal av lærlingum

Tá ið hugsað verður um tørvin, metir arbeiðsbólkurin tað vera hóskandi, um einir 6 næmingar gjørdu lærusáttmála og byrjaðu støðisútbúgvingina innan landbúnað á hvørjum ári. Roknast kann við, at umleið helvtin av teimum avlærdu taka við festum, meðan hin helvtin fer í starv hjá einum festara.

## 5. Skipan av útbúgvingini

### 5.1 Býtið millum verkliga læru og skúlagongd

Arbeiðsbólkurin metir 3 ár at vera hóskandi lærutíð. Eisini er ein fortreyt, at lærlingarnir eftir lokna yrkisútbúgving hava møguleika at koma inn á framhaldandi útbúgvingar, eins og lærlingar, sum hava lokið aðrar yrkisútbúgvingar.

Sambært yrkisútbúgvingarlógini skulu lærupláss og lærlingur gera lærusáttmála sínamillum áðrenn læran byrjar. Somuleiðis er ásett í lógini, at fyrstu 3 mánaðirnar eru royndatíðarskeið fyri báðar partar. Annars er lærusáttmálin millum partarnar bindandi og bert í serligum førum ber til at verða loystur frá sáttmálanum, um partarnir annars eru samdir um hetta.

Tá ið fyrstu lærlingarnir eru avlærdir, verður mælt til, at skipanin verður endurskoðað, og møguligar dagføringar gjørdar.

Arbeiðsbólkurin metir, at ein útbúgvingarbygnaður, sum á vári 2001 var skotin upp í áliti yrkisútbúgving innan fiskaídnað og havbúnað, í stóran mun eisini kann nýtast í eini yrkisútbúgving innan landbúnað. Á tann hátt ber eisini til hjá teimum lutfalsliga fáu lærlingunum, ið árliga kunnu væntast at fara undir yrkisútbúgving innan landbúnað, at samlesa við fiskiídnaðar- og havbúnaðarlærlingum. Innihaldið í hesum útbúgvingum er á mangan hátt samanfallandi: almennu lærugreinirnar eru tær somu og í yrkislærugreinum má undirvísing í matvøruviðurskiftum roknast sum ein sera týðandi partur.

Tey trý árini, meðan læran fer fram, eru býtt í 3 partar:

- Fyrsta árið er eitt støðisár á skúla við almennum og yrkislærugreinum, ið endar við próvtøkum.
- Annað árið fer fram í einum brúki, har lærlingurin har fær upplæring innan tey ymsu virkisøkini, ið hoyra árstíðunum til.

- Triðja árið heldur uppléringin í brúkinum fram, umframt at lærlingurin er í skúla í 12 vikur í yrkislærugreinum. Í hesum tíðarskeiði verður skipað fyri yrkisroynd á sama hátt sum í øðrum yrkisútbúgvingum.




Arbeiðsbólkurin er sannførdur um, at tað er av stórum týdningi, at lærlingurin fær roynt seg á læruplássinum, áðrenn hann byrjar í skúla og fær vissu um, at hetta er tann leiðin, hann ynskir at fara. Í støðisárinum er størsti parturin av skúlagongdini. Talan er um 40 samanhangandi vikur, sum enda við próvtøku. Eftir hetta fer hann aftur á garðin og fær framhaldandi upplæring í yrkinum. Skúlagongdin gevur eina ástøðiliga barlast, ið lærlingurin kann nýta í verkligu uppléringini, eins og seinni sum grundarlag undir møguligari framhaldandi útbúgving. Við at skipa útbúgvingina soleiðis, at lærlingurin annað árið er á læruplássinum burturav, fevna verkligu royndirnar um tað virksemi, ið tær ymsu árstíðirnar hava við sær.

Tann skipan, ið mælt verður til frammanfyri, er – eins og uppskotið um yrkisútbúgvingin innan fiskaídnað og havbúnað – eitt sindur øðrvísi samansett enn eitt nú yrkisúbúgvingarnar innan handverk, soleiðis sum vit kenna tær í dag. Her er meginreglan, at lærlingurin skiftir oftari millum læurupláss og skúla.

Arbeiðsbólkurin metir, at útbúgvingin kann skipast á tann hátt, at lærlingarnir í landbúnaðarútbúgvingini taka tær almennu grundlærugreinirnar (føroyskt, enskt, støddfrøði, alis- og evnafrøði, lívfrøði og samfelagsfrøði) saman við lærlingunum

í hinum útbúgvingunum á skúlanum. Harafturat verður mett, at til ber at samlesa í nøkrum av fakligu grundlærugreinunum, t.d. kunningartøkni og reinføri.

Miðað eigur at verða í móti, at útbúgvingin kann vera grundarlag undir framhaldandi útbúgvingum innan landbúnað í teimum flestu av hinum norðurlondunum.

# 6. Ymisk viðurskifti í sambandi við skúlagongdina

## 6.1 Broytingar í verandi lógum og kunngerðum

Í sambandi við, at tað frammanundan er skotið upp, at um yrkisútbúgvingar innan fiskiídnað og havbúnað eiga at fara fram á Fiskivinnuskúlanum, er mælt til at lógin fyri Fiskivinnuskúlan gerst liðiligari, soleiðis at skúlin serliga lýkur treytirnar í lógini um yrkisskúlar. Við at leggja skúlapartin hjá landbúnaðarlærlingum inn á sama skúla, kann enn størri herðsla leggjast á hetta tilmæli.

## 6.2 Skúlagongd í Føroyum ella uttanlands

Við tí uppskoti, sum arbeiðsbólkurin hevur lýst frammanfyri, verður hildið, at, rættast er at skipa alla útbúgvingina í Føroyum, m.a. av tí at vit ómakaleyst kunnu samskipa største partin av skúlagongdini við undirvísingina á Fiskivinnuskúlanum, við serligum atliti at lærlingum innan fiskiídnað og havbúnað.

Uppskotið hjá arbeiðsbólkinum um yrkisútbúgvingarskipan innan landbúnað samsvarar í ávísan mun við ta skipan, ið finst í Danmark undir heitinum "faglært landmand". Henda danska útbúgvingin er skipað í 2 partar, har fyrri parturin er 19 mánaðir við 7 mánaða skúlagongd og seinni partur 23 mánaðir við 6 mánaða skúlagongd. Sostatt er samlaða útbúgvingartíðin í uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum heldur styttri, men skúlaparturin er á leið tann sami. Mett verður tí, at lærlingar, ið hava lokið útbúgvingina eftir tí leisti, sum arbeiðsbólkurin skjýtir upp, fáa somu førleikar sum tey, ið hava tilsvarandi donsku útbúgvingina. Arbeiðsbólkurin hevur ikki gjørt samanberingar við landbúnaðarútbúgvingar í øðrum londum.

Arbeiðsbólkurin heitir á avvarðandi myndugleikar, at spurningurin um fulla góðkenning av útbúgvingini, serliga við atliti at førleikakrøvunum til víðari útbúgving, verður kannaður nærri. Tó heldur arbeiðsbólkurin, at hetta er tryggjað við, at lærlingarnir sambært uppskotinum hava 6 almennar grundlærugreinir á C-stigi.

## 6.3 Kostnaður

Av tí uppskotið snýr seg um eina útbúgving, har talan væntandi verður um fáar lærlingar hvørt árið (sbr. bls. 7), og útbúgvingin í stóran mun verður samskipað við undirvísingina í støðisárinum innan fiskivinnu, serliga við atliti at ætlaðu yrkisútbúgvingini innan fiskiídnað og havbúnað, mugu fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum metast at vera rættiliga avmarkaðar.

Í uppskotinum eru 3/5 grundlærugreinir, har samlisið verður við øðrum næmingum á skúlanum, meðan 2/5 eru yrkislærulærugreinir, har lærlingar fyri ein part samlesa (sbr. bls. 11). Tó fer eisini at verða undirvíst í yrkislærugreinum við serligum atliti at ávísum yrkjum og koma lærlingar innan landbúnaðin sostatt at fáa undirvísing, sum vendir sær serliga til teir.

Ikki fyrr enn nærri lýsing er gjørd av einstøku yrkislærugreinunum, ber til at gera eina nágreinliga meting av, hvussu nógv skúlaparturin fer at kosta. Um vit hugsa okkum, at helvtin av yrkislærugreinunum í støðisárinumn, tvs, 1/5 av skúla-gongdini, eru serstakar fyri landbúnaðarlærlingarnar, kann kostnaðurin av hesum leysliga setast til 25 tús. kr. í fíggjarárinum 2002 (hálvt undirvísingarár) og 50 tús. kr. í 2003. Í fíggjarárinum 2004 og frameftir verða skúlaútreiðslurnar mettar til 125 tús. kr. um árið, íroknað seinna skúlaskeiðið, sum er 12 vikur, fyrstu ferð á heysti í 2004.

Umframt skúlaútreiðslur, verður talan um ávísar lógarbundnar útreiðslur til lønarendurgjald meðan lærlingurin gongur í skúla. Sum dømi er roknað við, at **6 lærlingar** byrja á hvørjum ári.

*Samlaður kostnaður í tús. kr.*

| Fíggjarár | Skúlagongd | Lønarendurgjald[2] | Samlað útreiðsla |
|---|---|---|---|
| **2002** | 25 | 25 | 50 |
| **2003** | 50 | 60 | 110 |
| **2004 og frameftir** | 125 | 75 | 200 |

Roknað verður síðan við eini javnari tilgongd av lærlingum hvørt ár, soleiðis at árligu útreiðslurnar fyri landskassan tilsamans verða 200 tús. kr. sambært galdandi lønarendurgjaldi og um sáttmálar fyri hetta øki koma at liggja á sama støði, sum í handverksvinnuni.

Lagt eigur at verða upp fyri, at tað kann gerast neyðugt við serligari undir-vísingarútgerð, um lærlingaútbúgvingar verða settar á stovn innan landbúnaðin.

Víst er á frammanfyri, at lærlingarnir eiga at taka part av yrkislærugreinunum á Búnaðardepilin, serliga við atliti at yrkislærugreinunum í skúlaskeiðinum seinasta árið. Møguliga verður neyðugt at útvega ávísa útgerð í hesum sambandi, sum vinnan vanliga brúkar, umframt starvsstovuútgerð av ymiskum slagi. Við at samstarva við garðar um at nýta útgerð hjá teimum í undirvísingarhøpi, kunnu slíkar íløgur tó avmarkast, samstundis sum at lærlingurin kann seta dagliga raksturin og arbeiðsgongdina inn í eitt størri høpi. Her verður hugsað um størri tól, eitt nú fóðringsskipanir og tílíkt. Tá ið hugsað verður um ta framgongd, ið ein útbúgving kann væntast at hava við sær fyri vinnuna, metir bólkurin, at íløgan í útbúgving sera skjótt vinnur seg innaftur.

[2] Roknað er út frá einari tilgond upp á 6 lærlingar um árið. Í 2004 og framyvir er talan um 6 lærlingar x 40 vikur x vikulønina + 6 lærlingar x 12 vikur x vikulønina.

## 7. Uppskúlingarskeið

Umframt eina regluliga yrkisútbúgving, mælir arbeiðsbólkurin til, at serligi tørvurin hjá teimum, sum longu hava drúgvar royndir innan landbúnaðin, verður nøktaður við eini eftirútbúgving. Hugsað verður um eitt uppskúlingarskeið, soleiðis sum formaðurin í Bóndafelag Føroya mælir til í brævi, dagfest hin 14. mars 2001: *"Síðani lóg um landsjørð frá 1988 kom í gildi, eru krøv um teoretiska útbúgving so líðandi sett nýggjum festarum. Tað eru fleiri tilstundandi festarar, sum eru "etableraðir" og ikki lúka minstamark til teoretiskum kunnleika fyri at yvirtaka fedranna festi ..... Nøkur av hesum eru soleiðis fyri, at tað ikki er møguligt at fara av landinum til tess at nema sær hendan kravda kunnleika. Lærlingar eru á Royndarstøðini, sum eisini eiga rætt til teoretiska útbúgving, og mugu í dag fara uttanlands til hetta. Heldur ikki meti eg tað rætt at senda fleiri enn neyðugt av landinum at útbúgva seg, um tað ber til, at vit sjálvi skilagott kunnu skipa fyri hesi útbúgving og laga hana eftir okkara tørvi"*.

Víðari verður sagt í brævinum: *"Skúlin verður fyriskipaður í Búnaðardeplinum t.d. yvir tveir vetrar sum dagskeið ella kvøldskeið t.d í tíðarskeiðinum 1/10-1/4. Skúlaskeiðið kundi verið skipað sum ein arbeiðsmarknaðarútbúgving og bert verið sett í verk tá eitt minstamark av studentum luttaka. Skilagott hevði verið at samstarva við t.d. Noreg, ísland og Danmark til tess at fáa útbúgvingina góðkenda til víðari lesnað har (fyri ung, sum t.d. kundu tikið ein part av útbúgvingini her í Føroyum og hildið á fram uttanlands)"*.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við sjónarmiðunum hjá formanni Bóndafelagsins. Harafturat er arbeiðsbólkurin kunnaður um, at tilstundandi festarar eru, sum ikki uppfylla treytirnar um útbúgving fyri at kunna yvirtaka festið. Tískil er ivasamt, um hesir festarar hava neyðugu fyritreytirnar fyri at kunna reka garðarnar sum á nøktandi hátt, nú fleiri øki eisini innan landbúnaðin eru vorðin meira framkomin og krevja tøkniliga vitan.

Fyri at javnseta hesar festarar við vælútbúnar ungar bøndur, verður tí mælt til, at skipað verður fyri einum uppskúlingarskeiði, har bert tær yrkisligu læru-greinarnar, sum tørvur er á, verða lisnar. Arbeiðsbólkurin kundi hugsað sær, at serliga uppskúlingarskeiðið kemur at taka uml. 200 tímar, møguliga yvir 2 vetrarhálvur, við uml. 10 tímum um vikuna í 10 vikur í hvørji vetrarhálvu, av tí at flestu luttakarnar samstundis eisini skulu røkja garðin.

Skeiðætlanin kundi havt fylgjandi innihald:

| *Lærugrein* | *Tímatal* |
|---|---|
| Búskapur | 30 |
| Húsdjór | 40 |
| Høvuðsuppgáva | 10 |
| Lívfrøði og náttúra | 20 |
| Plantur | 50 |
| Tøkni | 50 |
| ***Tilsamans*** | ***200*** |

Mælt verður til, at skeiðið verður hildið á Búnaðardeplinum í Kollafirði, og at undirvísarar koma frá viðkomandi stovnum, t.d. agronomar, djóralæknar, Jarðaráðið og Heilsusføðisliga Starvstovan.

Útreiðslurnar til eitt slíkt skeið eru avmarkaðar til ta løn, ið undirvísararnir skulu hava. Arbeiðsbólkurin hevur mett hesa upphædd at fara at verða uml. 70 tús. kr.

## 8. Niðurstøða arbeiðsbólksins

Arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum lagt dent á, at uppskotið um eina skipan av yrkisútbúgving innan landbúnaðin í størst møguligan mun er í samsvari við ynskjunum hjá vinnuni, samstundis sum skipanin í størst møguligan mun eisini nøktar útbúgvingartørvin hjá lærlingunum bæði við atliti at vinnuførleika eftir lokna læru eins og framhaldandi lestrarførleika. Sí eisini samandráttin av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum á bls. 3.

Harafturat metir arbeiðsbólkurin uppskúlingarskeiðið, ið mælt verður til, at kunna nøkta tørvin hjá teimum, sum longu sita sum bøndur, men sum vanta eitt útbúgvingarstøði at arbeiða út frá.

Bólkurin er av teirri meting, at hann í hesum áliti hevur lýst tey viðurskifti, sum honum varð álagt í tilnevningarskrivinum. Haraftrat metir bólkurin at skipanin, soleiðis sum hon er lýst í hesum áliti, lýkur tey krøv, sum verða sett til eina yrkisútbúgvingarskipan.

*Tórshavn, 7. september 2001*

*Peder Th. Haahr, formaður*

*Regin Borðoy*

*Petur Oluf Hansen*

*Hans A. Dam Joensen*

## Yvirlit yvir brúk í føroyska landbúnaðinum, sum í fyrstu atløgu verða mett at kunna vera lærupláss



**9 garðar** **Kirkjubø, Velbastað, Tórshavn, Syðradalur**
**5 -** **Kaldbak**
**5 -** **Kollafjørður**
**2 -** **Restin av Norðurstreymoy**
**10 -** **Eysturoy**
**4 -** **Vágoy**
**4 -** **Norðuroyggjar**
**7 -** **Sandoy**
**3 -** **Suðuroy**

**49 garðar** **tilsamans**
**4 -** **Norðuroyggjar**
**7 -** **Sandoy**
**3 -** **Suðuroy**

**49 garðar** **tilsamans**